# 83 ára gamal á floti í nýggjum báti á gomlum leiðum

– Vit avgjørdu at stevna inn á Neshamar á Nesi og náddu inn higar við egnari hjálp. Nú kom smiðjumaðurin umborð aftur, og endin var, at hann avgjørdi at koma við okkum til útróðrar, so hann veruliga kundi ”kekka” maskinuna



Lagið er gott á tí 83 ára gamla, nú lagt verður frá landi



Nei, teir tosa ikki saman í telefon, men tosa við hvør sína unnustu, áðrenn lagt verður frá landi aftur

HUGLEIÐING

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*myndir: Vilmund Jacobsen*

Hann er 83 ára gamalur, men bæði knáur og klárur, sum ein annar unglingi.

Í mong ár hevði hann ”hjallin á sjónum”, og tey seinnu árini av arbeiðslívinum arbeiddi hann í fiski.

At ”bundin er bátleysur maður”, man hann hava sannað, síðan hann fyri nøkrum árum síðan seldi fitta og snøgga træbátin, hann hevði í nøkur ár. Knøini vóru farin at bila, men nú tey eru skift, er eingin trupulleiki at standa í báti ein heilan dag.

Men nú eigur hann ongan bát at fara við...

Og tó.

Eigur tú ein góðan systurson, sum eisini dámar væl at flóta, er einki ómøguligt.

Ein góðan dag herfyri slapp 83 ára gamli, Hans Jacob á Gadd á Nesi, aftur at royna seg í báti, sum hann so mangan hevur gjørt áður.

Báturin hjá systursoninum, Albergi, er júst vorðin longdur á SD-Beding, og man í dag vera um 30 føtur til longdar.

Góður og rúmligur er Norðkapp, nú hann er flotaður aftur, og við somu maskinu er ferðin størri enn áður.

– Hetta er ikki besta tíð til smáfisk, helt Hans Jacob fyri, tá ið vit spentir loystu í Oyrunum á Toftum hendan tokuta morgun.

Síðan báturin bleiv flotaður aftur eftir leingjanina, høvdu smávegis trupulleikar verið við brennioljuføringini.

So nú skuldi roynast aftur, um alt var í lagi.

Í dýrdarveðri úteftir Skálafjørðinum riggaðu vit snørini til, og Hans Jacob hevði sjálvur teir húkar við sær, sum hann ynskti at hava undir teininum, ið hekk undir snelluni.

Agnið var rækur og makrelur.

Tann 83 ára gamli valdi at hava ein vanligan seiðapilk og ein stoyptan húk undir.

Uttan at síggja land, kastaðu vit fyrstu ferð suður úr Eystnesi. Tað rak vestur – og so hvørt, sum vit róku vestur í fjørðin, var líkt til, at rákið harðnaði nakað.

Vit høvdu ikki ligið leingi, fyrr enn vit varnaðust, at maskinan ikki gekk, sum hon skuldi. Hon slóknaði, men startaði í fyrstu syfti aftur. At enda lógu vit og fingu ikki í gongd aftur.

Meðan vit róku vesturyvir og suður í Nólsoyarfjørð, fingu vit allatíðina onkran fisk, og tí valdu vit at hava snørini úti, meðan vit bíðaðu eftir ”hjálp”.

Vit høvdu góða tíð, og tímdu tí ikki at leika so í.

Suður úr Hólmafles gjørdist botnurin so ringur – og rákið var so hart, at snørini stundum hingu føst.

Tað kostaði okkum tað eina loddið.

Men at reka uttan motor í tímar, nyttaði ikki nógv, um dagurin skuldi vignast. Tí ringdi bátseigarin til dugnaliga smiðjumannin, Søren S. Danielsen.

Tað gekk ikki long tíð, til smiðjumaðurin og Páll Højgaard í útróðrarbátinum Trúgva, sum Páll rekur, vóru á veg suður í fjørðin.

Komin umborð, tók tað ikki langa tíð hjá smiðjumanninum at fáa bátin í gongd aftur. Hann fann plastikspønir í oljupumpuni, og tá ið hann hevði sett pumpuna